# Víkingar á ferð

Einaferð vóru tað nakrir víkingar, sum búðu á Klettoyggj. Har var gott at búgva, men nóg so keðiligt til tíðir, so viðhvørt noyddust víkingarnir á ferð við skipum sínum. Skipari á størsta knørrinum æt Krunki, og á hinari snekkjuni var Fjatla skipari. Ein dagin manglaðu tey skerpikjøt og kleynur, - tey høvdu faktiskt bara etið drýl og bananir í langsamiliga tíð, so nú høvdu Ravnur og Bláböka mist tolið. Tey trongdu til okkurt annað, og so var tað nokk so rotið bara at vera á Klettoyggj og spæla playstation. Víkingar eru ikki gjørdir til playstation. Tey søgdu við Gorp, at allir víkingarnir áttu at farið at herja kring oyggjarnar, so teir fingu upp í posa og sekk av øllum. Hetta var eitt frálíkt hugskot, helt Kráka. "Kom, vit mugu alt fyri eitt bera øllum boðini, at víkingarnir fara á ferð!" segði Kráka. Boðini fóru sum rótasúpan kring Klettoyggj, og dagurin var ikki gamal, tá stóðu allir víkingarnir ferðabúnir. Fjatla var fyrst at loysa, og umborð hjá henni var serliga Ravnur álitismaður. Kráka sigldi saman við Gorpi, sum hevði ábyrgd av seglinum umborð á "Havrenningi". Bláböka og Ravnur sigldu við "Nornagesti", sum var bygdur úti á Klettoyggj. Tað var flott at síggja víkingarnar fara við skipum sínum, og eftir sum teir høvdu góðan byr, so gekk ikki leingi, til víkingarnir lendu á einum stað, ið sá út til at flóta í skerpikjøti og kleynum. Staðið æt Matarvík, og Krunki akslaði síni skinn og fór niðan í tann fyrsta og tann besta hjallin at ræna kjøt. Fjatla legði á kovan í teimum størstu bóndahúsunum og gjørdi eitt satt kleynukvetti. Har vóru so nógvar kleynur, at hon mátti hava Krunka at hjálpa sær. Bláböka fór inn í eitt hoyggjhús og fann eina rúgvu av telduspølum, m.a. eitt sum víkingarnir høvdu ynskt sær í langa tíð. Gorpur var reiðiliga fegin um herfongin og helt, at teir mundu vera frægasta víkingar, ið verið høvdu í Føroyum.

Gorpur

Krunki

Ravnur

Fjatla

Kráka

Bláböka

# Familjan fer útferð

"Áh," segði mamman, "endiliga ein summardagur. Nú kann familjan fara útferð." "Ja", róptu Mjøll og Sævar, "hvar fara vit?" spurdi Sævar. Vit fara til Tjørnuvíkar", segði pápin, " og abbi í Kollafirði skal við". "Tekur hann Spyruna við?" spurdi Sævar. "Ja, tað er eitt gott hugskot, so kunnu tit spæla við hana á sandinum, meðan vit eru har," segði mamman. "Ja, vit kunnu renna kapp, kasta við pinnum og fáa Spyruna at svimja, tað dámar henni so ræðuliga væl," segði Mjøll. "Ja, og tit kunnu leypa á bláman, um tit troysta tykkum," segði pápin. "Hey, vit mugu ringja til abba og biðja hann gera seg kláran. Vit mugu siga, at familjan fer útferð til Tjørnuvíkar," segði mamman. "Eg ringi", segði Sævar, "og eg biði abba taka Spyruna við." Eingin lurtaði eftir honum, tí øll vóru farin at gera klárt, og tað gekk bara hálvur tími, so stóð øll familjan í túninum – klár at fara. Ja, tað vil siga næstan øll familjan, tí abbin manglaði, men tað var tí, hann var í Kollafirði, og tey vóru í Havn. Tey koyrdu eftir oyggj, tí veðrið var so gott og útsýnið frálíkt. Mjøll og Sævar taldu tjøldur á baksetrinum, og pápin kikaði eftir onkrum, meðan mamman koyrdi. Í Kollafirði komu abbin og Spyran uppí, og so gekk leiðin til Tjørnuvíkar. Spyran var so glað og læt við halanum, tá hon sá alla familjuna. Í Tjørnuvík var veðrið av tí besta, Mjøll fór at keypa ís. Hon hevði fingið pengar frá pápanum at keypa ís til alla familjuna. Tað var sakin at vera í Tjørnuvík. Sævar vildi helst renna kapp, og Mjøll vildi helst kasta pinnar og steinar, so tey skiftust um at bestemma, og gjørdu tað, sum bæði tímdu. Pápin settist at práta við abba um seyð og jørð, meðan mamma las í bók. Spyran svam og risti vatni úr sær, beint har sum mamman lá og las, og pápin kústaði hana burtur, men hon legði einki í tað, hon hugdi eftir tí vakra sandslottinum, sum Mjøll hevði bygt. Jú, gott at vera í Tjørnuvík, øll familjan var so glað.

Mamman

Pápin

Spyran

Mjøll

Sævar